Porsche Cayman S:

# Aftur ein nýggjur Porsche í november




*Porsche Cayman S er ein sera snøggur sportsvognur við karossaríi úr aluminium*

**26. november 2005 verður ein heilt nýggjur Porsche presenteraður hjá Porsche A.G. í Stuttgart. Talan verður um Cayman S, sum er bygdur yvir Porsche Boxster-røðina**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Við fyrsta eygnakast líkist Porsche Cayman S einum eyðkendum Porsche sportsvogni, men við sínum sjálvstøðuga designi skilir hann seg hóast alt út frá hinum.

Cayman S er ein sera snøggur sportsvognur við karossaríi úr aluminium og stórari baklúku, eins og ein hatchback. Pláss er til nakað av viðføri í 260 litra stóra viðførisrúminum aftan. Framman er eisini eitt viðførisrúm upp á 150 litrar, so tilsamans er pláss til 410 litrar av viðføri, sum ikki er so heilt lítið fyri ein sportsvogn í hesum klassanum. Sitipláss er einans til tveir persónar.

Motorurin er ein heilt nýggjur 6 syl. boxermotorur við 295 hk, ið situr í miðjuni á bilinum - framman fyri bakaksilin. Motorurin koyrir frá 0-100 km/t upp á 5,4 sek. Toppferðin er 275 km/t.

Saman við PSM (Porsche Satbility Magagment), ið er standard, setur alu-karossaríið heilt nýggjan standard fyri koyridynamikki og aktivari trygd.

Sum eykaútgerð fæst Cayman S við PASM (Porsche Active Suspension Managment), ið kann senka undirvognin við 10 mm og tilpassar seg automatiskt koyriumstøðunum.

Í Danmark kemur bilurin at kosta yvir tvær milliónir krónur.




*Bilurin hevur stóra baklúku, eins og ein hatchback. Leggið til merkis dupultu útstoytini*



*Cayman S er ein eyðkendur Porsche, men við sínum sjálvstøðuga designi*

## Volvo-navnið 90 ár



Volvo-navnið sá fyrstu ferð dagsins ljós á svensku SKF kúleguverksmiðjuni í juni 1915. SKF fóru tá at gera kúlulegur til bilar, og hesar kúlulegur skuldu hava eitt navn. Eitt av starvsfólkunum kom við uppskotinum um navnið Volvo, sum merkir "eg rulli".

Síðan 1926 hevur navnið verið brúkt á svensku Volvo-bilunum. Í dag koyra meira enn 8. milliónir Volvo í øllum heiminum.

*Kelda: www.vpdpresse.dk*